## Kirkjubøar kommuna søknast eftir

# Leiðara og 3 pedagogum

### til Barnagarðin á Velbastað

### *Pedagogar*

Vit søknast eftir trimum pedagogum, einum til hvørja stovu.

Høvuðsuppgávan er at skapa fastar, tryggar karmar um dagin hjá børnunum, og við spæli og øðrum tiltøkum, t.d. húsligum uppgávum, at hjálpa børnunum at mennast sum einstaklingar og sum partar av størri heildum.

Arbeiðið fevnir um planlegging, praktiskar uppgávur í sambandi við máltíðir og ansing annars, og um íverksetan av tiltøkum og spølum.

***Førleiki***
Umsøkjarar mugu hava pedagogiska útbúgving. Royndir innan arbeiði í vøggustovu/barnagarði eru ein fyrimunur, men ikki fortreyt.

Annars er av týdningi, at umsøkjarar kunnu arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og vilja vera við til at seta sín dám á stovnin.

***Setanarviðurskifti***
Størvini eru frá 1. juni 2002 ella skjótast til ber. Tó kunnu vit bíða eina tíð eftir tí rætta umsøkjaranum. Arbeiðstíðin kann vera 40, 35 ella 30 tímar um vikuna. Lønin verður eftir avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið/kommunurnar. Í umsóknini kann vera tilskilað, um umsøkjarin hevur ynski um at arbeiða í ávísari stovu.

### *Leiðari*

Sum leiðari fært tú her møguleika at gera hugsanir tínar til veruleika um, hvussu ein barnagarður gerst eitt vælvirkandi námsfrøðiligt tilboð í nærumhvørvinum. Arbeiðsøkið hjá leiðaranum er at leggja ætlanir fyri árið og leiða dagliga virksemið í samsvari við pedagogisku stevnuna hjá stovninum.

Uppgávurnar fevna um upptøku av børnum, fíggjarstýring (bókhald og ársroknskapur verða gjørd av kommununi), at skipa dagliga virksemið, vaktir og innkeyp, at umsita starvsfólkaviðurskifti so sum starvssetanir, lønir, farloyvi, skeið v.m., samstarv og kunning við foreldur, foreldra- og bygdarráð og samskipan av felags tiltøkum annars.

Leiðarin hevur ábyrgd av, at skipanir eru, sum lúka almenn krøv, t.d. innan trygd og heilsu. Umráðandi er, at leiðarin alsamt dagførir sína vitan á námsfrøðiliga økinum.

***Førleiki***
Leiðarin má hava pedagogiska útbúgving og hegni og áhuga fyri leiðslu. Til ber at víkja frá útbúgvingarkravinum, men umsøkjari má skjalprógva aðra viðkomandi útbúgving og leiðsluroyndir.

***Setanarviðurskifti***
Starvið er frá 1.juni 2002, men vit bíða fegin eftir rætta fólkinum. Lønin verður eftir avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið/kommunurnar. Harumframt er møguleiki at tingast um viðbót.

Vit hava um neyðugt pláss á stovninum fyri børnum teirra, sum sett verða í leiðarastarvið og pedagogstørvini.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Elina Henriksen, leiðara, á tlf. 328121 / velbarn@post.olivant.fo ella Óluvu Niclasen, bygdarráðslim, á tlf. 328145 / oluvanic@hfs.fo

***Umsókn***
Umsókn saman við prógvum og upplýsingum um royndir skulu sendast Kirkjubøar kommunu v/Annfinn Brekkstein, 176 Velbastaður innan **1. apríl 2002**.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Barnagarðurin á Velbastað er ein kommunalur stovnur við einari fíggjarætlan uppá 2,3 milliónir árliga. Stovnurin liggur í friðaligum umhvørvi við stórum spæliplássi og haganum rundanum.

Har eru 40 børn av Velbastað, úr Kirkjubø, úr Syðradali og úr Havn. Børnini eru millum 1/2 og 9 ár og eru í trimum stovum, har aldursbýtið er 0-2 ár, 2-4 ár og 4-9 ár. Tað eru 11 starvsfólk, svarandi til umleið 9 fulltíðarstørv.

Endamálsorðingin hjá stovninum er frá 1997 og soljóðandi: "Endamálið er at skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar, bæði kropsliga og sálarliga og tryggja, at børnini faa nógvar og ríkar upplivingar. Vit ynskja, at børnini ótarnað skulu sleppa at spæla; harumframt skulu tey sleppa at vera við til at taka avgerðir, og starvsfólkini skulu lurta eftir teimum og geva sær stundir til tey."

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrasystrar

### til psykiatriska Deild 1

Tvey avloysarastørv sum sjúkrasystir á **Deild 1** eru leys at søkja til setan frá 1. apríl 2002 til og við 31. august 2002. Talan er um brøk 0,7 í blandaðum vaktum.

Deildin er ein opin psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Á deildini arbeiða bert sjúkrasystrar. Vit arbeiða tvørfakligt á einum høgum fakligum støði við teimum nýggjastu terapihættunum. Arbeiðsumhvørvið er áhugavert, krevjandi og hevur nógvar avbjóðingar.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrasystir
- fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkraróktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja telefon 31 35 40, Bergit Weihe, yvirsjúkrasystir, lokal 351 - e-post: bergitw@ahs.fo ella til Marin Samuelsen, deildarsjúkrasystir, lokal 421.

Umsóknarfreistin er 25. mars 2002 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður 13. mars 2002 kl. 19[30].

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

**Dagsskrá:**
1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing frá stjórnini fyri farna árið
3. Framløga av grannskoðaðum roknskap
4. Val av skattmeistara
5. Val av einum stjórnarlimi
6. Val av tveimum tiltakslimum til stjórnina
7. Áseting av limagjaldi
8. Uppskot frá nevndini um lógarbroytingar
9. Ymiskt

Nevndin


**SLANGUVOGNAR**
við t.d. 60 m 1" slangu



- Brandslangur
- Eldsløkkjarar
- Brandteppir

Væl hóskandi til havnir, virkir, stovnar, skúlar og aðrar bygningar.

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008



**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**
Nú eisini úr Føroyskum grótí
Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN




HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN
Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# 2 djóralæknar til fiskasjúkuøkið

2 nýggj fulltíðar djóralæknastørv eru leys at søkja á Fiskasjúkudeildini til setan 1. mai 2002 ella skjótast gjørligt.

**Djóralækni 1**
Høvuðsuppgávurnar vera sjúkugreiningar / diagnostikkur av fiskasjúkum, heilsuyvirvøka, umsiting av djórasjúkulógini og eftirlit við aling.

Í byrjanini verður tað serliga eftirlit við fiskasjúkuviðurskiftum við nýtslu av brunnbátum, laksasláturvirkjum, góðskingarvirkjum og bygningum hjá alistøðum á landi, nú nýggjar lógar- og kunngerðarreglur skulu setast í verk.

**Djóralækni 2**
Høvuðsuppgávurnar verða eisini eftirlit og málsviðgerð, men haraftrat kemur sýnismóttøka og handfaring av sýnum í sambandi við sjúkuprogramm av kleyvdýrum.

Eisini verða uppgávur í sambandi við umsiting av djórasjúkulóggávuni og alment sláturefirlit. Í byrjanini verða uppgávurnar í sambandi við kleyvdýrini tær størstu.

**Faklig krøv**
- Útbúgving sum djóralækni við norðurlendskari autorisatión
- Góð samstarvsevni
- Sjálvstøðug/ur og miðvís/ur
- Koyrikort til bil

**Fyrimunir**
- Starvsroyndir við fiskasjúkum
- Góður EDV-kunnleiki

**Vit bjóða**
- Gott arbeiðsumhvørvi og stórar fakligar avbjóðingar
- Góðar møguleikar fyri eftirútbúgving og víðari útbúgving

**Løn v.m.**
Setanartreytir sambært sáttmála millum Magistarafelagið og Fíggjarmálastýrið, sí heimasíðuna www.lnd.fo

**Umsóknarfreist**
Umsókn við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. apríl 2002.

**Upplýsingar**
Upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Peter S. Østergaard, deildarleiðara, ella Bárð Enni, stjóra.

**Fiskasjúkudeildin**
Heilsufrøðiliga starvsstovan er býtt upp í 3 meginøki; eftirlit, og kanningarstovur og verkætlanir.

Fiskasjúkudeildin er saman við kemisku og mikrobiologisku kanningarstovunum á V.U. Hammershaimbsgøtu 11 (Debesartrøð) í Tórshavn.

Fiskasjúkudeildin er ein nýggj kanningarstova, sum enn er undir uppbygging. Diagnostisku greiningarhættirnir eru virologiskur diagnostikkur (kyknualing), PCR og ELISA-tøkni. Útbyggingin kemur í fyrsta umfari at snúgva seg um ISA-, BKD- og IPN-diagnostikk við denti á virologi, PCR og histologiskum og immunohistokemiskum greiningarhættum.

**Almannastovan**
Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 196
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

# Løgfrøðingur

Á nýstovnaðu leiðsluskrivstovuni hjá Almannastovuni er brúk fyri einum løgfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving. Leiðsluskrivstovan hevur ábyrgdina av, at setningurin hjá Almannastovuni verður framdur í tráð við politikk og viðtøkur annars.

**Høvuðsuppgávurnar eru**
- Ráðgeva og vegleiða leiðsluni í løgfrøðisligum og fyrisitingarligum spurningum
- Ummæla uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðger
- Gera innanhýsis reglugerðir
- Gera vegleiðingar, tá Kærustovnurin broytir avgerðir Almannastovunar
- Tryggja at lógir og kunngerðir verða umsitnar á rættan hátt
- Tryggja at stovnurin kunnar almenningin um rættindi og skyldur sambært almannalóggávuni
- Verða partur av tvørfakligum samarbeiði á stovninum

**Førleikakrøv**
Vit ímynda okkum ein persón, sum hevur løgfrøðisligt embætisprógv ella aðra viðkomandi útbúgving. Kunnleiki til almenna umsiting, almannalóggávuna og samfelagsviðurskifti annars er ein fyrimunur. Fólk, sum eru í ferð við at gera seg lidnan við lesnaðin, hava eisini ein møguleika at søkja. Dentur verður lagdur á góðan málkunnleika og kunnleika til EDV.

**Vit bjóða**
- Sjálvstøðugt starv við fjølbroyttum og avbjóðandi uppgávum
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag. Setanarøki er Almannastovan við øllum deildum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru J. Joensen, stjóra, á tlf. 318312 lokal 105 ella fartlf. 215480.

**Umsókn**
Umsólkn við avriti av prógvum skal sendast til:

Petra J. Joensen, stjóri
**Almannastovan**
Postboks 3096
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist**
1. apríl 2002.


**Nýggj sól í Dj. Geilsgøtu 29**



Tilboð í mars:
5 min. fyri 10,-

við fløguspælara og voice-guide

Kom og royn tað nýggjasta innan sólir í Føroyum

Hjá Birnu
Dj. Geilsgøta 29
Tlf. 312033



FA. GRAVSTEINAR
Velbastaðvegur 45
Box 336
110 Tórshavn
Tlf. 320370
Fax. 321470
Far. 214270

Gravsteinar
Gravplátur
Blómukassar
Gravkantar
Nýggja áskrift
Umvæling

Opið:
mán-fríggj. 9[00]-17[00]
annars samb. avtalu.

Vøruskráð kan fáast!



Suðuroyingar!
Nýtt skeið
Buss Lastbil Trailara
Avmarkað næmingatal!
byrjar í Suðuroynni
mánakv. 11. mars - kl. 20.30
nærri fæst at vita: SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82 • Tel 318821 • 315298 • Fartel 218777 • hajah@post.olivant.fo
Telefonin svarar frá kl. 15.00 - 16.30



Sosialurin

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo